gult6 cyan6 magenta6 svart6



## Fundur um Teistan útsettur

**Flogfarið úr Aberdeen í gjár førdi við sær, at tað bar ikki til at hava fund um sandoyarferjuna sum ætlað**



ÓSEMJA
*Áki Bertholdsen*

Tað eydnaðist ikki at hava fundin, sum ætlanin var at hava um nýggja sandoyarkipið, Teistan í gjár.

Annars høvdu Fíggjarmálastýrið og Skipara- og Navigatørfelagið avtalað at hava fund á Sandi í gjár í eini roynd at loysa ósemjuna um Teistan.

Fundurin skuldi vera seinnapartin, men hann mátti útsetast. Síðani var ætlanin at halda fundin í gjárkvøldið kl. 19. Men á miðdegi í gjár var tað eisini ivingarsamt. Sostatt verður fundurin ikki, fyrrenn í dag.

Orsøkin er, at Ellintur Abrahamsen, formaður í Skipara-og Navigatørfelagnum, hevur verið í Skotlandi á silvurbrúdleypsferð. Hann skuldi koma heimaftur í gjáramorgunin, men flogfarið varð seinkað og seinastu fráboðaninar søgdu, at tað fleyg beint eftir miðdag í gjár.

Ellintur Abrahamsen sigur, at á fundinum mugu ymisk ivamál ruddast av vegnum. Eitt nú tvíheldur heldur Skipara- og Navigatørfelagið um, at Fíggjarmálastýrið hevur bjóða felagnum at ólka Teistan í bólki 1, har bara Smyril er frammanundan.

Men síðani er tilboðið tikið aftur, og nú skal Teistin ístaðin setast í bólk tvey, har Dúgvan og Ternan eru. Tað hevði felagið góðtikið, men trupulleikin hevur verið at finna l-narkarmin fyri yvirmenninar

# Aftur ein trolari komin til Vágs

**Rækjutrolarin fer til fiskiskap fyrsta dagin. Fyrst gongur leiðin í Barentshavið, vágbingar vóna, at teir eisini sleppa til Flemmish Cap við honum**

FISKISKAPUR
*Áki Bertholdsen*

Nú er aftur ein nýggjur trolari komin til Vágs.

Tað hendi fríggjadagin, tá ið rækjutrolarin, sum Jákup Olsen úr Vági og Eyðun Johannesen av Tvøroyri, hava keypt úr Íslandi.

Talan er um íslendska rækjutrolaran, Ice Cap, sum nú er keyptur til Føroyar. Hann eitur nú Hvannaberg og er skrásettur í Vági.

Leygardagin fór báturin tilk Havnar, har okkurt smávegis skal gerast við hann fyri at lúka krøvini frá Skipasýninum og Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.

Jákup Olsen sigur, at í hesi vikuni fer báturin suður aftur til Vágs at tak at taka lemmar, proviant og at bunkra og síðani fer hann til fiskiskap.

Tað verður Eyðun Johannesen, sum skal føra bátin og fyrst gongur leiðin eystur í Barentshavið á rækjuleiðirnar við Svaldbard. 14 mans verða við skipinum.



*Nýggi rækjutrolarin í Vági, Hvannaberg, er nú í Havn, har seinastu góðkenningarnar frá Skipasýni og Heilsuføðiligu Starvsstovuni verða fingnar til vega. Hann fer til fiskiskap fyrsta dagin*

### 14 milliónir

Trolarin, sum nú er keyptur til Vágs, er bygdur í Noregi til Grønlands í 1978. Síðani er hann seldur til Íslands, haðani hann nú er komin til Vágs.

Báturin kostaði 14 milliónir at keypa, men Jákup Olsen heldur, at teir hava fingið ein góðan bát.

Tað er norski finansbankin, sum hevur fíggjað hann.

Talan er ikki um ein av teimum størstu rækjubátunum. Tað mesta, teir hava havt í hesum bátinum, eru 270 tons.

Nú verður nógv ført fram um, hvussu lágir rækjuprísirnir eru. Var hetta rætta tíðin at keypa rækjutrolara?

– Fiskaprísirnir hava altíð gingið upp og niður, so tað stúra vit ikki so illa fyri. Teir fara væl uppeftir aftur einaferð.

Hann sigur eisini at hóast hetta ikki er av størstu rækjutrolarunum, er hann ikki so lítil kortini, at tað skuldi verið nøkur forðing.

Hann vísur á, at talan er um eina lutfalsliga lítla íløgu.

– Fáa vit tað ikki at bera til við einum skipi fyri 14 milliónir, so vænti eg, at aðrir rækjutrolarar, sum kosta yvir 100, fáa tað enn truplari, sigur hann.

Hann sigur, at hann er so mikið stórur, at teir kunnu royna allastaðni við honum og hann hevur eisini fiskað á Flemmish Cap, har hann var mest, tá ið íslendingar høvdu hann.

Fyribils hevur báturin bara fingið fiskidagar í Barentshavinum, men Jákup Olsen vónar, at teir eisini fáa fiskiloyvi á Flemmish Cap.

Hann vísir á, at Ocean Pride, sum eisini er keyptur í flotan nýliga, hevur fingið fiskiloyvi á Flemmish Cap og hann væntar ikki, at Landsstýrið fer at viðgera suðuroyingar øðrvísi.

# Hava ikki ráð til at lata vera

**– Vit hava ikki ráð til at lata vera við at útvega okkum fleiri rækjuskip, heldur Jákup Olsen í Vági, hóast fleiri siga, at tað er ikki grundarlag fyri fleiri**

FISKISKAPUR
*Áki Bertholdsen*

– Sjálvsagt skulu vit útvega okkum fleiri rækjuskip.

Jákup Olsen í Vági, sum sjálvur annar akkurát nú hevur keyp rækjutyrolara úr Íslandi, er ikki samdur við teimum sum siga, at tað er ikki rúmd fyri fleiri rækjutrolarum úr Føroyum.

Eitt nú hevur Felagið Rækjuskip staðiliga mælt frá at geva loyvi til fleiri rækjuskip í Føroyum.

Men hesum tekur Jákup Olsen ikki undir við.

Hann sigur tvørtur ímóti, at vit mugu útbyggja okkara rækjuflota, tí vit hava ikki ráð til annað.

### Mist helvtina

Jákup Olsen vísir á, at fyri nøkrum árum síðani høvdu føroyingar 2.700 fiskidagar við Svaldbard.

– Nú hava vit bara helvtina eftir. Ein orsøk til, at vit hava mist helvtina av fiskidøgunum viå Svaldbard, er, at vit hava ikki brúkt teir dagarnar, vit hava havt. Og tá ið vit ikki brúka dagarnar, er eisini ringt at tvíhalda um, at vit skulu hava teir og tað hava vit heldur ikki klárað.

– Tað, sum vit hava mist, hevði verið nóg mikið til eini fimm rækjutrolarar at liva av.

– Skulu vit varðveita okkara fiskirættindi, er tað neyðugt at vit brúka tey. Men í løtuni er ongin rækjutrolari við Svalbard, tí teir eru allir samlir á Flemmish Cap. Tí er tað ein spurningur, um vit ikki fara at missa meir við Svaldbard, um vit ikki brúka dagarnar. Og tað hevur samfelagð ikki ráð til, sigur Jákup Olsen.



*– Vit hava ikki ráð til at missa fleiri fiskirættindi eftir rækjum. Tí mugu vit útvega okkum fleiri rækjuskip, sigur Jákup Olsen. Sjálvur annar hevur hann nú keypt rækjutrolara úr íslandi*

Hann leggur afturat, at rækjumenn eru ikki ósekir í, at vit hava mist so nógv rættindi, sum vit hava mist, tí teir hava forðað landsstýrinum í at geva fleiri rækjutrolarum fiskiloyvi og sostatt í at fáa fleiri trolarar í flotan.

Hann sigur, at sjálvandi er ein orsøk til, at rækjutrolararnir trunka seg saman á Flemmish Cap.

– Har er meiri at fáa og rækjurnar eru størri. Men tað merkir ikki, at rækjurnar í Barentshavinum ikki kunnu brúkast. Og tað gevur okkum ikki rætt til at lata tey fiskirættindi fara fyri skeytið, sigur Jàkup Olsen.

gult7 cyan7 magenta7 svart7



Jørgen Niclassen, landsstýrismaður:

# Samskiftið um yvirtøkur er frálíkt



*Jørgen Niclassen sigur seg ikki skilja, hví Høgni Hoydal gremur seg so nógv um vánaligt samskifti við danskar myndugleikar. Tí hann upplivir sjálvur beint tað øvugta, sigur hann*

**Jørgen Niclassen, landsstýrismaður, sigur seg hava frálíkt samskifti við danskar myndugleikar um ætlaðu yvirtøkuna av Skipasýninum. Tí skilir hann ikki áhaldandi útmeldingarnar um, hvussu trupult tað er hjá landsstýrinum at samskifta við danir**

YVIRTØKUR
*John Johannessen*

– Tað hevur ongantíð verið ein trupulleiki at samskifta við danir um yvirtøkur, so eg skilji ikki, hví Høgni Hoydal alla tíðina gremur seg um, hvussu vánaligt samskiftið er.

Hetta sigur Jørgen Niclassen, landsstýrismaður í fiskivinnumálum fyri Fólkaflokkin, í sambandi við arbeiðið at fáa yvirtikið málsøki eftir sjálvstýrisleistinum hjá landsstýrinum.

Í Dagblaðnum mánadagin sigur Jørgen Niclassen, at hann als ikki skilir, at Høgni Hoydal seinastu tíðina hevur gramt seg óført um, at hann ikki fær svar frá dønum.

### Gongst væl at samráðast

– Í seinastuni havi eg í hvørjari tíðindasending í Útvarpinum hoyrt frá Høgna Hoydal um, hvussu illa tað gongst at samskifta við danir. Og eg má siga, at eg eri vorðin troyttur av hesum. Tí í mínum samskifti við danir, um at yvirtaka Skipaeftirlitið, hava eingir trupulleikar verið, sigur Jørgen Niclassen við Sosialin.

– Í sambandi við ætlaðu yvirtøkuna av Skipaeftirlitinum hevur vanlig mannagongd verið, at vit møta væl fyrireikaðir á fund, har vit frá dønum fáa at vita, at teir fegnir vilja hjálpa til. Og eg skilji á mínum partamanni, Bjarna Djurholm, at tað gongst á sama hátt hjá honum, sigur Jørgen Niclassen.

Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum heldur tí, at landsstýrið heldur má leggja seg eftur at fáa nakað at henda, enn at gremja seg um vánaligt samskifti.

– Eg havi ta fatan, at málini verða best loyst uttan konfliktir, staðfestir Jørgen Niclassen, landsstýrismaður.

### Skulu sjálvsagt gjalda

Jørgen Niclassen sigur seg hava fingið at vita frá donskum myndugleikum, at teir meta tað vera í fínasta lagi, at føroyingar yvirtaka, men at hetta merkir, at vit so eisini skulu gjalda.

– Eg havi fingið at vita frá dønum, at teir fegnir vilja vera við til at hjálpa okkum at stápað eitt føroyskt Skipaeftirlit á beinini, men at vit mugu gjalda fyri hetta. Og tað haldi eg vera í fínasta lagi. Sjálvsagt mugu vit gjalda, um vit skulu valda, sigur Jørgen Niclassen.

Hetta sama heldur Jørgen Niclassen vera sjálvsagt í spurninginum um at yvirtaka flogvøllin. Hann sigur, at Fólkaflokkurin sjálvsagt hevði verið fegin, um danir útbygdu flogvøllin, áðrenn føroyingar yvirtóku hann. Men tá danir ikki vilja útbyggja hann, mugu vit velja, um vit vilja yvirtaka vøllin og síðani útbyggja hann, ella um vit skulu lata vera at yvirtaka hann.

– Tað er jú púra sjálvsagt, at tú mást gjalda fyri tað, tú vilt hava ræði yvir, sigur Jørgen Niclassen, sum heldur, at landsstýrið nú bara skal fara í gongd við at arbeiða miðvíst við yvirtøkuætlanunum.

# Eidesgaard skal hitta Blair

**Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins, er boðin at vera við á árskongressini hjá Labour í heyst og har hitta Tony Blair, formann í Labour og forsætisráðharra Bretlands**

VITJAN
*John Johannessen*

Frá 30. september til 4. oktober í ár skal formaður Javnaðarfloksis vera gestur á árskongressini hjá stóra stjórnarflokkinum í Bretlandi, Labour.

Jóannes Eidesgaard fekk nýliga bræv frá skrivstovuni hjá Labour, har tað millum annað verður sagt, at flokkurin kennir tað sum eina æru at bjóða honum við til árskongressina í ár.

### Hittir Blair

Skráin fyri árskongressina er ikki endaliga løgd enn, men tó hevur Jóannes Eidesgaard fingið at vita, at kongressin verður sett sunnudagin 30 september á middegi og varir til hóskvøldið 4. oktober. Týsdagin seinnapart skal Tony Blair halda røðu, sum verður uppfylgd av einum spurnarorðaskifti, og mikukvøldið skulu gestir úr brøðraflokkum eta saman við Blair.

– Eg vænti, at eg antin týsdagin ella mikukvøldið sleppi at hitta Blair sjálvan, sigur Jóannes Eidesgaard.

Formaður Javnaðarfloksins sigur, at tað hevur verið vanligt, at formenn fyri føroyska Javnaðarflokkin er bodnir á landsfundir hjá brøðraflokkunum í Danmark og Íslandi. Men hetta er fyrstu ferð, at hann nakar frá Javnaðarflokkinum er boðin at hitta formannin í bretska Labour flokkinum.

Jóannes Eidesgaard er einaferð áður boðin á fund við Labour. Hesin var í Glasgow fyrr í ár, men hann hevði ikki møguleika at fara til tann fundin. Men í november ætlar hann sær at møta upp, sigur hann.

# Edward Fuglø fær virðisløn

**Á middegi mánadagin varð endaliga gjørt av, at Edward Fuglø skal fáa norðurlendsku barnabókavirðislønina í ár**

VIRÐISLØN
*John Johannessen*

Seint í heyst ella tíðliga í vetur fær listarmaðurin Edward Fuglø handaða norðurlendsku barnabókavirðislønina frá Norðurlendska Skúlabókavarðafelagnum.

Hetta er sama virðisløn, sum Ólavur Michelsen í 1991 fekk fyri bókina »Rossini í Skoradali«.

Edward Fuglø fær virðislønina fyri tekningar sínar í bókunum »Vinmenn« og »Veingjaða myrkrið«.

Virðislønin, sum Edward Fuglø fær, er ikki ein av teimum virðislønunum, sum gevur nógvar pengar, men tó plagar hon at geva nógva umrøðu, sum listarfólk eisini hava brúk fyri.

# Føroya Bjór hevur keypt Jolly



**Danska felagsheitið fyri cola er nú vorðið føroyskt. Føroya Bjór keypti mánadagin rættindini til at kalla coladrykkin fyri Jolly**

MARKNAÐAR-FØRING
*John Johannessen*

Føroya Bjór eigur nú øll rættindi til Jolly-merkið.

Hetta hendi, tá Føroya Bjór í dag endaliga fekk í lag keypsavtalu við A/S Dansk Coladrik um Jolly-merkið.

Frá seinast í seksti árunum til einaferð í áttatiárunum var Jolly felagsmerkið hjá øllum donskum bryggjaríum. Men brádliga fingu tey størstu bryggjaríini sær annað merkið. Hendan gongd endaði so við, at Albani bryggjaríið keypti Jolly merkið í 1997, og Føroya Bjór slapp at nýta tað saman við Albani.

Í november í fjør bleiv Albani keypt av Bryggerigruppen, sum er eitt samstarv millum Ceres, Faxe og Thor. Og eftir drúgvar samráðingar við hetta samtak, er Føroya Bjór sloppið at keypa rættindini til Jolly-merkið.

Føroya Bjór sigur í tíðindaskrivi, at Jolly hevur verið ógvuliga væl umtókt, síðani tað kom á føroyska marknaðin, og er í dag nógv mest selda sodavatnið í Føroyum.